Bankamálið:

Stjórnin fekk eina lítla sigar

Úrslitið av spurnarorðaskiftinum endaði sum roknað varð við frammanundan. Dagsskráin, sum avtalað varð millum stjórnina og flokkarnar vinstrumegin, varð samtykt seint týskvøldið



Týsdagin var spurnarorðaskifti um bankakanningina í Fólkatinginum. Úrslitið varð, at myndugleikarnir fingu eina lítla sigar fyri teirra leiklut í bankamálinum

SVEINUR POULSEN

Spurnarorðaskiftið í Fólkatinginum endaði seint týskvøldið, og úrslitið varð sum væntað.

Stjórnin fekk eina sigar, men hon var lítil.

Orsøkin til hetta var, at stjórnin og flokkarnir vinstrumegin stjórnina samtyktu eina dagsskrá, sum bert gav stjórnini eina lítla nøs.

Tað leikaði annars hart á í Fólkatinginum til tíðir.

Borgarligu flokkarnir kundu ikki taka undir við tí dagsskrá, sum var løgd fyri Fólkatingið, men teir høvdu heldur ikki nakað uppskot at seta í staðin.

Teir borgarligu flokkarnir hildu tað vera løgna mannagongd, at stjórnin sjálv slapp at avgera, hvussu stór "sigarin" skuldi verða.

Føroysku umboðini eisini orðið

Tað tykist sum hevur forsætisráðharrin fingið ákoyringar fyri at verða ov linur mótvegis føroyingum, tí tá hann tók orðið seint týskvøldið gav hann føroyingum, og serliga Jóhannes Martin Olsen av grovfýlini.

Hann vendi sær beinleiðis til sambandsmannin og segði millum annað, at tað nú var uppá tíðina, at føroyingar góvust við at harta danir.

- Eg haldi eisini, at tað er uppá tíðina, at føroyingar takka okkum fyri, at vit hjálptu tykkum, tá neyðin var størst.

Poul Nyrup Rasmussen helt nevniliga, at føroyingar høvdu brúkt ov nógva orku til at geva dønum ábyrgdina av kreppuni og fyri bankamálið.

Jóhannes Martin Olsen lat ikki hesi boð liggja á sær. Hann fór á pallin og takkaði dønum so mirðiliga fyri, at teir høvdu hjálpt føroyingum.

Hann segði eisini, at allir føroyingar vóru glaðir fyri, at danir høvdu hjálpt okkum, og tað skuldi forsætisráðharrin vita.

Frank Aaen úr Eindarlistanum kom upp at kjakast við Óla Breckmann um, hvussu ríkir føroyingar vóru, um flyting av pengum fyrst ein veg og síðani hinvegin, og um skatting av teimum ríku í Føroyum.

Runukriggj

Tað kom týðuliga fram, at her vóru tvær ymiskar politiskar uppfatanir, sum rendu saman.

Tað var ikki bara galdandi í hesum førinum.

Ósemjan millum teir borgarligu flokkarnar øðrumegin og stuðulsflokkarnar hinumegin kom eisini greitt til sjóndar undir orðaskiftinum.

Aage Frandsen úr SF helt, at tað var betri at hanga stjórnina upp fyri tað, sum nú var komið fram. So var tað gjørt í hvussu er.

Hesum var Kirsten Jacobsen als ikki samd við honum í.

Hon helt, at tað hevði verið mundandi betri at bíða til fólkatingið hevur gjøgnumgingið øll skjølini, sum eru løgd fram í sambandi við málið.

Tað, teir borgarligu flokkarnir eru mest ónøgdir við, í dagsskránni sum var samtykt, er, at seinasta borgarliga stjórn Schlüters eisini fær ákoyringar fyri sín part í vánaligu støðu Føroya.

Teir meina ikki, at tað hevur nakað við bankamálið at gera, meðan hinir flokkarnir meina, at man ikki bara kann kritisera núverandi stjórn, tí skeiva gongdin byrjaði meðan borgarliga stjórnin sat, og hon gjørdi onki við málið.

Fylgjurnar

Tað sær tí ikki út til, at málið fær nakrar fylgjur fyri stjórnina ella nakran ráðharra.

Jagstranin hjá Uffe Ellemann-Jensen eftir Mogens Lykketofts sær tí út til at verða dottin á gólv.

Donsk bløð søgdu eisini í gjár, at tað var møguligt, at Føroya-málið endaði sum ein fyrimunur fyri Poul Nyrup Rasmussen heldur enn ein vansi.

Spurningurin er so um nakar av embætismonnunum verða drignir til svars fyri teirra leiklut.

Flokkar í fólkatinginum hava gjørt vart við, at teir kundu hugsað sær, at onkrir embætismenn verða revsaðir fyri teirra leiklut, men tað er óvist, hvussu verður við tí.

At embætismenn verða drignir til svars er ikki óvanligt í Danmark, sjálvt um tað ikki kemur so ofta fyri.

Øll minnast vit Tamilamálið, og tá vóru nakrir, sum máttu finna sær annað arbeiðið, bæði ráðharrar, fólkatingspolitikarar og embætismenn.

Fyri stuttari tíð síðani tók mál seg upp í sambandi við nýggja hýruvognslóg í Danmark.

Í einari kunngerð sum Ferðslumálaráðið hevði sent út, varð sett forboð fyri at útlendingar sluppu at koyra hýruvogn. Tað skuldu bara danir gera.

Hetta vakti mikla øsing í Danmark, og málið endaði við, at Bjørn Westh tók aftur kunngerðina.

Men málið endaði ikki har. Tveir embætismenn í "Trafikdepartementet" eru settir niður í tign og harvið fluttir til onnur, minni týðandi støðir, aðrastaðni á ráðstovuni.

Annar av hesum monnum er Calus Tornøe, sum var deildarleiðari í Ferðslumálaráðnum.

Ikki kann sigast at hann hevur verið serliga heppin, tí hann kom úr Løgmálaráðnum í sambandi við Tamilamálið, og nú noyðist hann aftur at finna seg í at fáa nýtt starv, sum ikki er so týdningarmikið.

Uppskot til samtyktar

Uppskotsstillarar: Pia Gjellerup (S), Aage Frandsen (SF), Bjørn Elmquist (RV og Frank Aaen (EL):

»Við støði í frágreiðingini frá kanningarnevndini í Føroya Banka-málinum staðfestir Fólkatingið:

- at fyrrverandi stjórnin á heysti 1992 fastlegði ætlanir við Fíggingargrunninum frá 1992 og tí »tvørministeriella« Føroyabólkinum, sum legði lunnarnar undir tað komandi handfaringina av búskaparkreppuni í Føroyum,
- at tað er orsøk til kritik, at skiftandi stjórnir síðani heystið 1992, hava latið vera við, at geva føroyska landsstýrinum teir upplýsingar, sum danska stjórnin og embætismenninir fingu, herundir eisini tað seinu fráboðan um áheitanina frá Den Danske Bank,
- at hvørki tað føroyska landsstýrið ella tann danska stjórnin høvdu eitt fullfíggjað grundarlag fyri at góðkenna partaumbrævabýtið,
- at Fíggjareftirlitið hevur uppført seg soleiðis, at tað er ógreitt fyri onnur, hvønn leiklut Fíggjareftirlitið hevði í sambandi við partabrævaumbýtið, at tað vóru ymiskar uppfatanir um uppgávan var handilslig ella politisk, og at tann mátin, donsku myndugleikarnir hava handfarið málið um partabrævaumbýtið uppá, var ófullkomin og ikki nøktandi, og
- at Den Danske Bank gav Landsstýrinum upplýsingar um Føroya Banka, sum ikki vóru dekkandi fyri tað faktisku støðu bankin var í.

Fólkatingið tekur til eftirtektar, at stjórnin kannar um grundarlag er fyri einari tænastumannakanning av embætismonnum.

Fólkatingið heitir tí á stjórnina um í samarbeiði við Landsstýrið:

- at kanna møguleikan fyri at seta fram endurgjalddskrav mótvegis bankanum
- at arbeiða fyri einum betri samskifti millum danskar og føroyskar myndugleikar, og
- at uppafturtaka samráðingar um samlaðu skuldina, so at afturgjaldingin verður tillagað orkuni hjá føroyska búskapinum«

Jóannes Eidesgaard:

Nyrup skift taktikk

SVEINUR POULSEN

– Orðaskiftið í Fólkatinginum vísti, at málið er vorðið eitt innanríkispolitiskt mál. Tað havi eg onga viðmerking til sum so.

– Tað verður val í Danmark í ár, og tað sást týðuliga, at valstríðið er byrjað.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard í einari stuttari viðmerking, til orðaskiftið á Fólkatingið týsdagin

Eftir hansara metan hevur forsætisráðharrin skift støðu, í mun til tað tíðindaskriv sum kom frá honum beint eftir at bankakanningin var almannakunngjørd.

– Tá segði hann, at stjórnin saman við Landsstýrinum skuldi tosa saman, um røttu mannagongdina fyri at áseta eitt passandi endurgjald til Landsstýrið, herundir eisini hvørji stig skuldu takast mótvegis Den Danske Bank.

– Nú tosar hann um nýggjar samráðingar um, hvussu skuldin skal afturgjaldast, sigur Jóannes Eidesgaard, og hann heldur fram:

– Hann royndi eisini at síðustilla stjórnina og Landsstýrið í bankamálinum viðvíkjandi upplýsingum um støðuna hjá bankanum.

– Hetta er púra burturvið. Føroyingar hava ongantíð havt teir upplýsingar sum stjórnin hevði.

Jóannes Eidesgaard metir eisini, at Nyrup er hvassari í orðum, enn hann var, tá hann var í Føroyum.

– Hann veit, at hann politiskt vinnur við at verða hvassur ímóti føroyingum.

Annars sigur Jóannes Eidesgaard, at teir nú bíða eftir upplegginum frá Landsstýrinum til eitt felags føroyskt útspæl.

– Eg haldi, at uppskotið um, at eitt umboð úr hvørjum flokki skal arbeiða viðari við málinum er eitt gott uppskot, sum vit skulu halda fast við.

Hann vil tó ikki tosa um, hvørjar tankar Javnaðarflokkurin hevur gjørt sær um støðuna.

– Eg haldi, at tað er skeivt, at koma inn á tað nú. Í fyrsta umfari bíða vit eftir útspælinum frá Landsstýrinum, sigur hann.